# ligt umborð

## Farið við aftur!

Fyrr um dagin ringdi Símun Pauli í land, og bað fólk koma á havnalagið í Ánunum um 10-tíðina, tá ætlanin var at leggja at landi.

Men tá Navigator rendi á land á Kunoyarnesi, var ikki annað hjá honum at gera enn at ringja kontra-boð í land.

- Eg ringdi í land og greiddi teimum frá støðuni. Eg bað tey ikki koma eftir mær beinanvegin, tí vit høvdu rent á land!

- Eg segði teimum, at eg skuldi ringja aftur seinni, tá eg visti meiri um, hvat fór at henda!

Saman við fleiri av manningini fór Símun Pauli fyrst umborð sjóbjargingarbátin "Ziska" og seinni í ein útróðrarbát, ið førdi hann trygt í land.

- Hóast hesa hendingina í gjárkvøldið, so fari eg við aftur. Eingin ivi um tað, sigur Símun Pauli.




*Ein froskmaður fráAtlantic Diving ger seg kláran at kanna botnin á Navigator. Botnurin skuldi kannast bæði aftan og framman*

Mynd: Jens Kr. Vang





*Við sær hevur froskmaðurin eitt upptøkutól, soleiðis at fólk í landi kunnu fylgja við í kanningararbeiðinum*

Mynd: Jens Kr. Vang






sera lítið merkta av tilburðinum.

Her er jú talan um nógv ungfólk, bæði menn og kvinnur, sum ikki hava verið so leingi á sjónum. Men líkt var til, at tey allar flestu føldu seg tryggan, hóast alt.

- Eg legði so ikki merki til nakran panikk. Øll vóru púra rólig, sigur hann.

Hann hevur sjálvur siglt við reiðarí'inum, síðani Navigator kom í 2000 - allar túrararnar, uttan tann fyrsta.

Men slíkt hevur hann so ikki upplivað áður.

- Ja, tað var eitt sindur undarligt at standa soleiðis uppi á landi, - so tætt, at ein nærum kundi havt lopið í land!, sigur hann við einum brosi.

Tá skipið hevði rent seg á land, fekk manningin boð um at lata seg í yvirlivilsisdraktir.

- Hetta gekk alt fyri seg uttan nakran dramatikk.

*Hevur tú upplivað aðrar slíkar ringar túrar á sjónum?*

- Nei, tað havi eg ikki. Og fyri tað næsta, so var hetta als ikki nakar ringur túrur: Hetta var faktiskt tann besti túrurin, vit nakrantíð hava gjørt!, sigur Símun Pauli.

> ” *Eg legði so ikki merki til nakran panikk. Øll vóru púra rólig*

## Má helst í dokk

Í morgun hevur froskmaður verið og kannað botnin á Navigator.

Eingin fæst enn at vátta tíðindini, men mangt bendir á, at skipið hevur fingið nakað av skaða í botnin, bæði frammanfyri og aftanfyri.

Neyðugt verður helst at fáa skaðan umvældan, men spurningurin er, hvar hetta skal gerast.

Í Klaksvík vænta menn, at umvælingin neyvan kann gerast í Føroyum. Neyðugt verður tí uttan iva at fara í dokk uttanlands.

*sb.*



*Navigator er komin trygt í havn eftir at hava rent á Kunoyarnes (í baksýni)*

Mynd: Jens Kr. Vang